# ARBEIÐSFÓLK

til Kollafjord Pelagic P/F

Vit sóknast eftir 15 arbeiðsfólkum til uppsjóvarvirkið Kollafjord Pelagic P/F. Talan er um arbeiði við maskinum og útgerð á einum tøkniligum høgum støði og er tað soleiðis ynskiligt at umsøkjarar hava eitt ávíst tøkniligt innlit. Hetta er tó eingin treyt.

Áhugað kunnu venda sær til:

Kollafjord Pelagic P/F
Inni í Firði
FO-410 Kollafjørður
Tel 21 88 56 og 21 88 61

Kollafjord Pelagic

Kollafjord Pelagic P/F er eitt nýtt uppsjóvarvirki í Kollafirði. Endamál virkisins er at virka uppsjóvarfisk til matnað. Framleiðsluorkan er í byrjanini uml. 1.000 tons um samdøgrið, men verður økt til 1.400 tons frá aug. 2002. Í fyrstani verður arbeitt í einum skifti, men hugsandi er, at farið verður til 2 skifti aftaná at innkoyringartíðin er farin. Framleiðslan verður í høvuðsheitum úr makreli, svartkjafti og sild. Fiskurin verður staddarskildur og pakkaður alt eftir kundans ynski og frystur í plátufrystarum og frystitunnlum. Framleiðslutólini eru á einum høgum tekniskum støði.


MFS:

# Á kunningarherferð um hægri útbúgvingar



*Mynd: Guðrið Weihe, t.v., og Halla Nolsøe Poulsen vóru hósdagin á handilsskúlanum og greiddu næmingunum har frá um víðari útbúgvingar. Næmingar lótu inn eftirmetingarskjal, og skoðsmálini vóru sum heild góð*

**Seinastu vikuna hava umboð fyri MFS ferðast kring oyggjarnar og greitt miðnámsskúlanæmingum frá um hægri útbúgvingar. Stigtakararnir leggja seg eftir at greiða frá um tey praktisku viðurskiftini, sum eru tengd einari nýggjari útbúgving í einum nýggjum landi**

ÚTBÚGVING
*Heri á Rógvi*

Meðan veturin letur upp fyri sínum síðsta mánað, er tíðin eisini vorðin búgvin hjá ungfólkum at hugsa um framtíðina og víðari lestur. Ein partur av hesum, tey á miðnámsskúlunum kring landið, hava hesa seinastu vikuna fingið vitjan frá MFS, Meginfelag føroyska studenta.

Tær báðar, Halla Nolsøe Poulsen og Guðrið Weihe, hava hildið fyrilestur fyri miðnámsskúlanæminugum kring landið.

– Ætlanin hjá okkum er at fanga tey, ið verða liðug við teirra útbúgving í summar, og siga teimum frá, hvat tey skulu gera og vænta sær. Vit greiða ikki frá um hvørja útbúgving sær, men siga heldur frá teimum praktisku viðurskiftunum, sigur Halla Nolsøe Poulsen, sum er virkandi formaður fyri MFS.

Tær báða leggja dent á, at tað hevur alstóran týdning, at tey ungu byrja at hugsa um í góðari tíð – eisini um tey ikki ætla sær at byrja eina útbúgving beinanvegin.

Halla sigur, at tað eru nógv praktisk viðurskifti, sum skulu fáast í rættlag, áðrenn ein fer av landinum í lestarørindum.

Tær báðar leggja dentin á at greiða frá, um hvussu tað er at fara undir hægri lestur í Danmark, tá ið tað er har, ið tær báðar lesa.

– Mann kann gott siga, at vit við hesum royna at skapa eitt samband við tey á miðnámsskúlunum, sum tørvur er á, og lestarvegleiðararnar ikki altíð kunnu, sigur Halla Nolsøe Poulsen.

Við sær kring oyggjarnar hava MFS-umboðini havt Holger Arnbjerg, ið er leiðari fyri Altjóða Skrivstovan, sum hevur til endamáls at stuðla og ráðgeva í sambandi við útbúgvingar uttanfyri kongaríkið.

– Tað vísir seg, at tað er ein stórur partur av teimum lesandi, ið leita aðrastaðni at lesa enn í kongaríkið. Tað er framvegis tann størsti parturin, ið fer til Danmarkar, og vit vilja fegin vegleiða og hjálpa øllum so nógv, ið vit kunnu, sigur Halla.

Tær báðar meta, at fólk fyrst og fremst skulu velja útfrá áhuga. Samstundis hevur tað stóran týdning, at alt verður gjørt í góðari tíð. Og at leita sær eftir onkrum at búgva í má gerast so skjótt sum gjørligt. Hóast vit nú skriva februar, er nóg mikið av tíð eftir til at søkja skúlar og bústað.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast á www.mfs.fo og við at senda teldubræv til msf@mfs.fo.


Nýggjur bilur: Hyundai Matrix



Frá 152.750,-
Bensin
175.750,-
Diesel

HONDA NORÐBIL ŠKODA Volkswagen Group HYUNDAI

Box 1070 - Oyggjarvegur - FO 110 Tórshavn - Føroyar - Tlf. 313707 - Fax 310855




# Fjúrtan grundstykki afturat í Runavík



*Sum so nógva aðrastaðni, er eisini trot á grundstykkjum í Runavíkar kommunu, men gongur sum ætlað, verða 14 grundstykki tøk afturat í summar*

**Tað standa eini 25 fólk í bíðilista at fáa Grundstykki í Runavík**

ÚTSTYKKING
*Áki Bertholdsen*

Nú fer Runavíkar Býráð at taka eitt tak fyri at ganga teimum á møti, sum hava søkt um grundstykki í Kommununi.

Á býráðsfundi í Runavík i gjárkvøldið, skuldi Býráðið samtykkja at at fara undir eina nýggja útstykking og borgarstjórin, Rodmundur Nielsen, ivast ikki í, at tað verður samtykt at fara undir útstykkingina.

Hann sigur, at talan er um eina útstykking við 14 grundstykkjum úti í Runavík, talan er um uttastu útstykkingina í kommununi.

Tað, sum Býráðið skuldi samtykkja í gjárkvøldið, var at bjóða arbeiðið at fyrireika útstykkingina út og hann sigur, at gongur sum ætlað, verða stykkini klár einaferð í summar.

Tá ið hendan útstykkingin er fingin frá hondini, verður farið víðari við øðrum útstykkingum í kommununi, fyri at kunna nøkta tørvin.

Tað er nóg mikið av byggilendi í Kommununi, ikki minst á teimum smáu bygdunum, men í løtuni vísir tað seg, sum um størsta trýstið er á sjálva Runavíkina.

Í løtuni verður arbeitt við at broyta býarætlanina, so at fleiri øki verða sett av til grundstykki og eydnast tað, fer tað at nøkta tørvin á byggilendi nógv ár fram.

Borgarstjórin sigur, at tað er trot á grundstykkjum í Runavík.

Hann sigur, at Kommunan hevur einar 25 umsóknir frá fólki, sum vilja hava grundstykki. Kanska eru tað ikki øll, sum vilja hava grundstykki beinanvegin, so tá ið tey 14 stykkini eru komin, fer tað at hjálpa væl.

– Spurningurin er bara, hvussu nógv grundstykki Kommunan megnar at útvega um árið, men klára vit eini 15- 20 stykki um árið, vildi eg mett, at vit so dánt klára at fylgja við eftirspurninginum, sigur Rodmundur Nielsen.

# Havnin liðug um tríggjar vikur



*Umstøðurnar á Runavíkar Havn hava ikki verið góðar, men nú verður nýggja havnalagið tikið í nýtslu og tað hjálpir væl um støðuna*

**Gongur sum ætlað, verður nýggja havnin í Runavík handað Kommununi 20. februar**

HAVNAÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*

Í eina hevur verið arbeitt við at byggja havnalagið í Runavík út.

Gongur sum væntað, verður arbeiðið liðugt í næsta mánað og ætlanin er, at arbeiðið skal handast Runavíkar Kommunu tann 20. februar.

Við hesi nýggju havnaútbyggingini, hevur kommunan fingið 100 metrar av atløguplássi afturat. Men harumframt fer kommunan eitt stykki upp á 10.000 fermetrar afturat niðri á havnalagnum.

Rodmund Nielsen, borgarstjóri, sigur, at tað er stórur tørvur á betri plássi niðri á havnalagnum, ikki minst í sambandi við oljuvinnuna.

Hetta er eitt arbeiði, sum hevur vart í næstan trý ár og sum hevur kostað einar 13 milliónir milliónir.

## Vegur samstundis

Rodmundur Nielsen sigur, at samstundis sum nýggja havnin nú verður tikin í nýtslu, verður farið undir arbeiðið at gera nýggja til og frákoyring til havnina.

Umstøðurnar at koma á og av havnalagnum eru ikki tær frægastu og tí hevur kommunan í eina tí fyrireika ein nýggjan veg.

Talan er um ein breiðan veg, sum verður umleið 700-800 metrar langur og farið verður undir arbeiðið nú í vár. Kommunan hevur sett 1,5 millión av til endamálið og borgarstjórin vónar at tað røkkur.


GRAMEX

Útgjalding úr Gramex-grunninum

Heitt verður á øll, ið framleiða føroyskar plátur, bond og ljómfløgur, um at senda skjalprógvað tilfar um, hvussu nógvar eindir av LP/MC/CD hvør einstakur framleiðari ella virki hevur framleitt í tíðarskeiðnum 01.01.2001 til 31.12.2001.
Upplýsingarnar kunnu vera váttan frá veitaranum um, hvussu nógvar eindir av hvørjum verki eru gjørdar. Avrit av fakturum yvir eindirnar kunnu eisini góðtakast.

Eru ivamál hesum viðvíkjandi, kunnu tit ringja til:
Gissur Patursson
Tlf. 319820/213535, fax 314955
Kristian Blak,
Tlf. 314815/225034, fax 314825
Hans Pauli Torgarð
Tlf. 312043/221638, fax 318617

Mannagongdin er síðani, at allar eindirnar verða taldar saman í stigum, ið so verða nýtt, tá samlaða upphæddin frá GRAMEX skal býtast.

Sjálv útgjaldingin verður í feb/mars 2002.

Alt tilfar skal sendast til:
Framleiðslufelagið • Postboks 1057 • FO-110 Tórshavn

Minnist til hesar váttanir:
1. Váttan um framleiddar eindir
2. Avrit av faktura
3. Váttan frá studio um tal av eindum ella tvítøkum

Seinasta freist fyri innlating er 16. februar 2002